ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 17. november 2009

# Ein stór uppliving

**Pauli, Sheila og Mona vóru samd um, at tað hevði verið ein stór uppliving at verið við til World Cup-kappingina í Berlin, har tey øll stóðu seg væl**




Hilmar Jan Hansen

At Suðuroyggin í nógvar máta gongur undan, tá talan er um svimjing, gekk sjón fyri søgn, nú føroyskir svimjarar aftur hava gjørt vart við seg uttanlands. Av teimum fýra svimjarunum, ið vóru við til World Cup í Berlin, vóru tríggir úr Suðuroyar Svimjifelag. Einasti, ið ikki var úr Suðuroynni, var Pauli Øssursson Mohr, ið er úr Fuglafjarðar Svimjifelag.

– Hetta var ein stór uppliving, og eg haldi, at eg havi lært nógv. Tíðirnar vóru eisini góðar, tí í 50 metra frísvimjing var eg bara fimm hundraðpartar frá føroyska metinum, Pál tók frá mær á Oyggjaleikunum, og í 100 metra frísvimjing betraði eg mína tíð við einum hundraðparti, segði Pauli um tey bæði persónligu metini, hann setti í Berlin.

– Eg eri ordiliga væl nøgdur, tí hetta er største kapping, eg havi verið við til. Allar heimsstjørnurnar vóru har, so tað legði sjálvandi eitt sindur av trýsti á. Men tá mótstøðan er so góð, lyftir tú teg sjálvan upp til at geva enn meira.



Eftir røður og handanir av blómutyssum stillaðu svimjararnir upp til eina felags mynd. Frá vinstru Mona Simonsen, Sheila Millum Garðarnar, Pauli Øssursson Mohr og Pál Joensen

Mynd: Jens Kr. Vang

### Gevur hug at dríva á

Sheila Millum Garðarnar hevur onkuntíð umhugsað at givist við svimjingini, og onkuntíð hevur hon eisini hálvavegna lagt svimjibúnan frá sær. Men hon er framvegis við og hevði góðar tíðir í Berlin. Hennara trupulleiki hevur verið, at hon hevur betrað seg alla tíðina, og tí hevur verið ringt at slept svimjingini, hóast hon hevur fult arbeiði við síðuna av.

– Nú havi eg upplivað so nógv, og hvørja einastu ferð hevur talan verið um góðar upplivingar. Eg hevði ikki verið til World Cup fyrr, so hetta var nakað serligt, og eg eri sera væl nøgd. Nú skal eg so eisini við til EM í Turkalandi, sum verður mín triðja EM-kapping, umframt at eg tvær ferðir havi verið við til HM, sigur Sheila, sum í Berlin var við í 50 og 100 metra frísvimjing.

Eisini Mona Simonsen læt væl at ferðini, ið fyri hennara viðkomandi gav góðar tíðir og eisini góðar plaseringar á longru teinunum í frísvimjing, sum hesa ferð vóru 400 og 800 metrar.

– Hetta var ein sera góð ferð, tí alt var á nógv hægri stigi, enn vit eru von við. Hetta var ordiliga stórt og umstøðurnar vóru av teimum allarbestu. Sjálvt vatnið var so gott, at tað kendist framúr væl at svimja, sigur Mona, ið viðgongur, at tað kann vera upp og niður við svimjingini, men at slíkar upplivingar sum henda gera, at hon tímir ordiliga væl at dríva á við svimjingini.

# Síggja fram til EM



Formaðurin í Svimjisambandinum, Jon Hestoy, átti eitt tað breiðasta brosið, tá móttøka var fyri føroysku World Cup-svimjarunum í gjár

Mynd: Jens Kr. Vang

**– Eftir hesar fantastisku World Cup-dagarnar síggja vit nú fram til EM-kappingina í Turkalandi, tí tá senda vit aftur eitt sterkt lið av svimjarum avstað, sigur Jon Hestoy, formaður í Svimjisambandinum**

Nógv brosandi andlit vóru at síggja á farstøðini í Havn í gjár, men tann, ið mundi eiga eitt hitt breiðasta brosið, var formaðurin í Svimjisambandinum, Jon Hestoy, ið fegnaðist um at fáa svimjararnar heimaftur, samstundis sum hann sá fram ímóti næstu avbjóðingini.

– Vit sótu og tosaðu um tað á veg suður av flogvøllinum, at tað er ótrúligt, at Pál eftir nýggju døgum kann taka norðurlendska metið á 1.500 metra teininum í frísvimjing, og síðani enntá betra tað tvær ferðir, segði Jon, ið longu beinanvegin hevði hug at skrúva tíðina ein mánað fram.

– Nú síggja vit fram til EM-kappingina í Istanbul í Turkalandi um fýra vikur, har hesir fýra svimjararnir verða við, umframt Kára J. á Høvdanum. Við Páli á odda stilla vit upp til EM við einum sterkum liði, so hvør veit, um vit ikki hittast aftur her um ein mánað ella so.

Jon Hestoy helt, at tað júst nú var ótrúliga stuttligt at vera formaður í Svimjisambandinum, tí tað gongur so væl og svimjingin er merkt av stórari entusiasmu. Samstundis legði hann dent á, at hetta ikki hevði borið til, um ikki almennu Føroyar hjálptu til við einari játtan til úrvalsítrótt.

– Í fjør var Pál við til eina World Cup-stevnu, sum var tann í Stockholm, men av tí at stuðulin nú er har, hevur í ár borið til hjá okkum at sent hann til tríggjar stevnur, bæði í Moskva, Stockholm og Berlin, umframt at hann hevur havt fysioterapeut við, sigur Jon Hestoy, ið vónar, at almennu Føroyar ikki sleppa her.

– Tað hevði verið deiligt at vitað, hvat vit kundu lagt til ræ ttis eftir 1. januar komandi, men tað skuldi undra meg, um ikki nøkur oyru komu aftur tá, tí er tað nakað, ið hevur leverað fullan valuta fyri pengarnar, so er tað Pál.

hil